# ÁRSFRÁGREIÐING 2025



SINNISBATI

**Sinnisbati**

c/o MEGD, Íslandsvegur 10C

FO-100 Tórshavn

Tlf: + 298 597913

Teldupostur: sinnisbati@sinnisbati.fo

www.sinnisbati.fo

**Nevnd**

Súsanna Olsen, forkvinna

Oda Jóhansdóttir, næstforkvinna

Minna Sólfinnsdóttir, skrivari

Joan B. Poulsen, kassameistari

Elisabeth Carlsson, nevndarlimur

Oddbjørg Johansen, nevndarlimur

Nuka Heinrich Eidesgaard, nevndarlimur

Vivian Sjóðklett, tiltakslimur

Margretha Poulsen, tiltakslimur

Annetta Saltá, tiltakslimur

**Starvsfólk**

Gunnhild Persson, aðalskrivari

Ninna R. Simonsen, skrivstovufólk

//Útgivið mars 2026

# INNIHALD


04 Formáli

05 Um Sinnisbata

08 Árið, ið fór

18 Framyvir

# FORORÐ

Í 2025 kunnu vit gleðast um, at peningur er settur av á løgtingsins fíggjarlóg til at stovna eitt Headspace tilboð í Føroyum. Hetta er sera stórt fyri Sinnisbata, og vit eru sinnað at átaka okkum uppgávuna at lyfta í felag saman við landi og kommunum at skapa eitt tilboð, ið gevur okkara ungdómi bestu líkindi at trívast og mennast.

Nýggj gransking frá 2025 hjá Region Hovedstadens Psykiatri staðfestir, at Headspace ráðgevingartilboðið veruliga kann betra sálarheilsuna og trivnaðin hjá ungum. Headspace spælir ein avgerðandi leiklut í at stuðla ungum og fyribyrgja, at sálarheilsan ikki versnar.

Vit hava í alt ov langa tíð bíðað eftir almennum skipanum, og nú vita vit, at átøk hjá sivilsamfelagnum rigga, og at tað hjálpur at seta tíðliga inn við fyribyrging og stuðli.

Umframt arbeiðið við Headspace, er 2025 eitt virkið ár hjá Sinnisbata við fleiri tiltøkum og nýggjum verkætlanum. Nevnast kann, at Sinnisbati hevur enduruppsett leikin *Løstir - ein leikur um sálarsjúku og at finna fótafestið* í Løkshøll í Runavík og skipað fyri útgávutiltaki til bókina *Undirfullir Heilar* saman við Bókadeildini, ADHD-felagnum, Autismuflagnum og Lesihúsinum.

Sinnisbati takkar øllum limum, stuðlum og sjálvbodnum hjartaliga fyri trúgvan stuðul í 2025. Ein serlig tøkk til Team Rynkeby Føroyar fyri aftur í ár at stuðla Sinnisbata og Lions Club Tórshavn fyri at stuðla Headspace verkætlanini við fígging til heimasíðu. Vit síggja fram til eitt spennandi nevndarár 2026.

Súsanna Olsen, forkvinna

Gunnhild Persson, aðalskrivari



# UM SINNISBATA

Sinnisbati er ein politiskt og átrúðnarliga óheftur felagsskapur, ið virkar fyri at bøta um korini hjá teimum við sálarsjúku og avvarðandi teirra. Við støði í ST-sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, arbeiða vit fyri at tryggja javnbjóðis møguleika og rættindi til okkara málbólk. Sinnisbati er eitt av 24 limafeløgum í MEGD, ið arbeiðir brekpolitiskt í øllum samfelagsviðurskiftum. Høvuðsuppgávurnar hjá okkum eru millum annað at veita upplýsing og kunning um sálarsjúku, og vegleiða um tilboð og viðgerðarmøguleikar í Føroyum. Vit skipa fyri tiltøkum og átøkum, samskipa verkætlanir og sjálvhjálparbólkar, somuleiðis sum vit arbeiða politiskt fyri viðurskiftum, sum tæna okkara málbólki. Eitt, ið hevur eyðkent felagið frá byrjan, er ymiskleikin, sum hevur myndað felagið og nevndina frá byrjan. Felagið er myndað av fakfólki, avvarðandi og fólkum við sjúkuroyndum, og hetta síggja vit sum okkara styrki.

**Nevndin**

Aðalfundurin er hægsti myndugleiki í felagnum, og verður hildin á hvørjum ári. Nevndin verður vald á aðalfundinum, og er mannað av 5 til 7 limum og minst tveimum tiltakslimum. Nevndarsetan er 2 ár og hvørt ár stendur helvtin fyri vali. Aftaná aðalfundin skipar nevndin seg við forfólki.

Aðalfundurin 2025 varð í MEGD-húsinum á Íslandsvegnum í Havn tann 25. mars. Áðrenn aðalfundin var framløga við Annu Tórunn á Stongum og Atimu Feodoru á Bø Olsen, sjúkrarøktarfrøðingar, við yvirskriftini “vegurin til persónligt recovery”. Seinastu árini hevur eitt skifti verið innan psykiatriska viðgerð, har recovery - at koma fyri seg, hevur vunnið fram. Anna Tórunn og Atima Feodora løgdu fram við støði í teirra bachelorritgerð, har tær hava kannað, hvussu sjúklingar við álvarsamari sálarsjúku uppliva

persónligt recovery í einum lítlum samfelagi sum Føroyar.

Í 2025 stóðu Súsanna Olsen, forkvinna, Oda Jóhansdóttir, næstforkvinna, Minna Sólfinnsdóttir og Vivian Sjóðklett, nevndarlimir, fyri vali. Allar ynsktu at stilla uppaftur. Birita Clementsen, sum hevur sitið sum tiltakslimur í eitt ár, ynskti at stilla upp. Nuka Heinrich Eidesgaard ynskti somuleiðis at stilla upp til nevndina á fyrsta sinni.

Tá fleiri ynskja at stilla upp, er atkvøðugreiðsla. Tær uppstillaðu greiddu stutt frá, hví tær vildu verða nevndarlimir í Sinnisbata. Tá atkvøðurnar vóru taldar, vórðu Súsanna Olsen, Oda Jóhansdóttir, Minna Sólfinnsdóttir og Nuka Heinrich Eidesgaard valdar í Nevndina. Birita Clementsen og Vivian Sjóðklett komu inn sum tiltakslimir. Margretha Poulsen og Annetta Saltá blivu somuleiðis valdar inn sum tiltakslimir.

**Á fyrsta nevndarfundi 9. apríl skipaði nevndin seg soleiðis:**

Súsann Olsen, forkvinna

Oda Jóhansdóttir, næstforkvinna

Minna Sólfinnsdóttir, skrivari

Joan B. Poulsen, kassameistari

Elisabeth Carlsson, nevndarlimur

Oddbjørg Johansen, nevndarlimur

Nuka Heinrich Eidesgaard, nevndarlimur

Vivian Sjóðklett, tiltakslimur

Margretha Poulsen, tiltakslimur

Birita Clementsen, tiltakslimur

Annetta Saltá, tiltakslimur

# SKRIVSTOVAN

Á Skrivstovuni starvast ein aðalskrivari 30 tímar um vikuna og eitt skrivstovufólk 3 tímar um vikuna. Arbeiðsuppgávurnar hjá skrivstovuni eru fjølbroyttar. Aðalskrivarin hevur ábyrgd av dagligu fyrisitingarligu leiðsluni á skrivstovu felagsins, umframt ábyrgd av starvsfólkum og tilknýttum fríyrkisfólkum, og at tryggja at málini hjá nevndini verða førd út í verk. Skrivstovufólkið tekur sær av bókhaldi og ymiskum fyrifallandi arbeiði á skrivstovuni.

**Skrivstovan 2025**

Í 2025 hevur skrivstovan serliga arbeitt við at gera eina strategi fyri komandi árini hjá Sinnisbata, arbeitt við at stovna eina Headspace ungdómsráðgeving og við at enduruppseta leikin, Løstir.

**Praktikantur á skrivstovuni**

Ninna R. Simonsen, sum hevur starvast sum skrivstovufólk hjá Sinnisbata síðani 2021, kom í samband við hennara lestur á Fróðskaparsetri Føroya, í praktikk hjá Sinnisbata tíðarskeiðið august-desembur. Ninna hevur serliga arbeitt við Headspace verkætlanini, umframt at hon í oktobur 2025 luttók sum ungt umboð á *Nordic Youth Disability Summit* í Stockholm í samband við at Norðurlandaráðið kom saman. Hetta var eitt gylt høvi at fáa ávirkan á norðurlendskan brekpolitik, og niðurstøðan, sum ungdómsumboðini komu fram til var, at barna- og ungdómssjónarmiðið manglar í norðurlendskum brekpolitikki. Vit takka Ninnu mangar ferðir fyri hennara íkast og góða arbeiði í praktikktíðini og fegnast, um at hon heldur áfram sum skrivstovufólk í Sinnisbata.

**Headspace ráðstevna**

Í novembur luttóku Gunnhild Persson, aðalskrivari og Berit Unn Petersen, verkætlanarleiðari í Headspace verkætlanini, á norðurlendskari Headspace ráðstevnu í Keypmannahavn.

Á ráðstevnuni varð nýggjasta granskingin um sálarheilsu hjá ungum løgd fram. Granskingin staðfestir enn einaferð, at tað riggar at seta tíðliga inn - bæði í mun til tann einstaka og í mun til samfelagið. WHO hevur í novembur í ár útgivið slóðbrótandi frágreiðing um sálarheilsuna hjá ungum í Evropa. Fyri fyrstuferð hava vit drúgvar dátur, ið vísa eina signifikanta øking á mistrivnaðinum hjá ungum, somuleiðis sum vit síggja eina gjógv í mun til atgongdina til hjálp og stuðul. Við frágreiðingini heitir WHO á landsins stjórnir um at syrgja fyri, at øll ung hava atgongd til hágóðsku sálarheilsutilboð og at endurhugsa tænasturnar, soleiðis at tær hóska til tørvin hjá tí unga.

“Headspace er meira enn bara eitt stað at leita sær hjálp”. Soleiðis segði Lærke, ein av teimum ungu, ið luttóku í ungdómspanelinum á ráðstevnuni.




Lærke greiddi frá, at Headspace eisini er eitt stað, har ung hugna sær við vinum og bara sleppa at vera, sum tey eru, uttan nakað trýst ella væntanir frá øðrum. Øll, sum luttóku í panelinum, vóru samd um, at hjálpin til ung eigur at vera skjót. Tað kom tíðiliga fram, at Headspace eigur at vera eitt stað, har mann eisini kann slappa av og hugna sær. Tað er alt avgerðandi, at staðið kennist trygt.



Umframt at luttaka á ráðstevnuni, luttóku Gunnhild og Berit á verkstovu saman við felagsskapum úr 13 ymiskum londum, sum øll arbeiða við sálarheilsuni hjá ungum. Eisini vitjaðu vit eina Headspace-miðstøð í Lyngby, og lærdu um, hvussu teirra tilboð er skipa. Hetta var ein sera lærurík túrur, ið gav nógvan íblástur til ungdómsráðgevingina í Føroyum.





*Gunnhild Persson, aðalskrivari*



*Ninna R. Simonsen, skrivstovufólk*

# Árið, ið fór

Ein stórur partur av arbeiðinum hjá Sinnisbata er at upplýsa og varpa ljós á sálarsjúku og líðing, arbeiða fyri meira opinleika í samfelagnum, vera við til at avstigmatisera og beina burtur tabu av psykiatriskum diagnosum. Hetta ger felagið millum annað við at skipa fyri tiltøkum í Føroyum, gera upplýsandi átøk á eitt nú sosialu miðlunum og skriva lesarabrøv og vera sjónlig í miðlunum. Sinnisbati skipar m.a á hvørjum ári fyri stórum tiltaki á altjóða sálarheilsudegnum. Nógv ymiskt virksemi hevur verið í Sinnisbata í nevndarárinum 2025, og í hesum kapitlinum greiða vit nærri frá virkseminum.

## KJATT-RÁÐGEVINGIN

Síðan 2020 hevur Sinnisbati havt dulnevnda kjatt-ráðgeving á heimasíðu okkara. Kjatt-ráðgevingin hevur síðani 2020 verið opin hvørt kvøld í vikuni ímillum 20.00-22.00. Ráðgevingin er mannað við sjálvbodnum fakfólki við heilsufrøðiligari, náms-frøðiligari og/ ella sosial-fakligari útbúgving. Vegna vantandi orku, valdi Sinnisbati í 2024 at skerja ráðgevingina niður í tríggjar dagar um vikuna.

Í 2025 hevur Sinnisbati eftirmett kjatt-ráðgevingina, og í summar 2025, bleiv avgerð tikin um at fyribils lata ráðgevingina aftur. Hetta, millum annað tí at færri hava vent sær og tí at arbeiðsorkan ikki er til tað. Ætlanin er, at kjattið skal opna aftur í nýggjum hami, tá Headspace ungdómsráðgevingin letur upp.

## SAMRØÐUBÓLKAR

Sinnisbati hevur síðani 2015 skipað fyri samrøðu-bólkum til avvarðandi at fólki við sálarsjúku - bæði til børn, ung og vaksin. Síðani 2021 hevur felagið eisini tikið stig til at bjóða bólkar til ung, ið kenna ótta og angist.

Í 2025 hevur Sinnisbati bjóðað ein bólk til ung, ið kenna ótta og angist og tveir bólkar fyri avvarðandi. Í 2025 hevur Sinnisbati eftirmett allar bólkarnar. Áhugin fyri at koma í avvarðandibólk er stórur og afturmeldingarnar eru sera góðar. Sinnisbati fær fleiri fyrispurningar frá avvarðandi gjøgnum árið, ið mangla eitt stað at venda sær og fáa hjálp. Í løtuni er einki annað tilboð til avvarðandi, og tí ætlar Sinnisbati framhaldandi at bjóða hetta tilboðið. Ótta- og angistbólkurin hevur verið sera væl dámdur, og luttøkan hevur eisini verið góð, men minkandi í 2025. Í 2026 hava vit fyribils steðg við bólkinum og fara at endurhugsa tilboðið.

## WHITEOUT - dansisýning

26. februar varð grønlendska dansisýningin Whiteout víst í Norðurlandahúsinum. Whiteout varpar ljós á eitt sera viðkvæmt evni um sorg eftir sjálvmorð, sum vit øll eiga at viðurkenna og ikki vera bangin fyri at tosa um.

Áðrenn sýningina bjóðaðu Norðurlandahúsið og Sinnisbati til orðaskifti um, hvussu tað er at vera avvarðandi hjá einum, ið hevur gjørt sjálvmorð. Luttakarar vóru: Kathrina Lindenskov Holm, sálarfrøðingur, Róa Midjord, gestaltterapeut og bólkaleiðari í avvarðandi bólkunum hjá Sinnisbata, og Tormóður Stórá, yvirlækni og leiðari á Psykiatriska deplinum á LS.

Hetta førdi eisini til, at evnið bleiv viðgjørt í Breddanum í KVF. Niðurstøðan frá orðaskiftinum og Breddanum var, at vit hava tørv á einari serskipan, sum kann lofta teimum, ið eru sjálvmorðshótt - ella eru illa fyri á annan hátt, og tí hava brúk fyri bráfeingishjálp.

## UNDIRFULL VIKA

Í samstarvi við Bókadeild Føroya Lærarafelags, ADHD-felagið, Autismufelagið og Lesihúsið skipaði Sinnisbati fyri tiltaki 20. mars í samband við undirfulla viku, har ljós varð varpað á neurodivergens, og hvussu ymiskir og undirfullir heilar eru.

Hetta kvøldið í Perluni varð bókin Undirfullir Heilar eftir Louise Gooding løgd fram. Bókin er ein eyðskild og hugkveikjandi innleiðing í autismu, ADHD, OCD, angist, orðblindni og mangt annað, sum bæði lítlir og stórir lesarar kunnu læra nógv av. Í 2024 samstarvaði Sinnisbati við Bókadeild Føroya Lærarafelags at týða bókina til Føroykst og útgeva hana.

Aftan á bókarframløguna við Beinir Bergsson, ið hevur týtt bókina, var livandi tónleikur við Ragnari Finsson, og síðan vóru søgur frá trimum neurodivergentum fólkum: Aleth Vang, Elisa Vang, Birita á Høgaryggi og Sigurð Lamhauge.

Tiltakið eydnaðist væl, og nógv fólk vóru møtt í Perluni, har bókin eisini varð til sølu. Avgerð varð tikin um at skipa fyri líknandi tiltaki aftur.

## LANDSINNSAVNING HJÁ MEGD

25. mai skipaði MEGD vegna síni 24 limafeløg fyri landsinnsavning, sum varð send beinleiðis í sjónvarpinum.

Tiltakið varð hildið í stórhøllini við Tjarnir, og á skránni var tónleikur við Lenu Andersen, Marius DC, Demenskórinum, Bass Elvis og Ester Skála, samrøður og innsløg um m.a. livikor hjá fólki, ið bera brek og varandi sjúku, og sjálvbodna arbeiðið hjá feløgunum. Innkomni peningurin fór óskerdur til limafeløgini hjá MEGD.





Ímyndan hevur størri týdning enn vitan
Citat : Albert Einstein





heilar



Yngst av 7
- havi í stóran mun fingið loyvi til at vera eg
Rúmandi og fevnandi familja
Vit vóru nógv úti í náttúruni

## ENDURUPPSETAN AV LØSTUM

Í mai 2024 hevði leikurin *“Løstir - ein leikur um sálarsjúku og at finna fótafestið”* frumsýning í Norðurlandahúsinum. Ætlanin var frá byrjan at ferðast runt í Føroyum við leikinum, soleiðis at so nógv fólk sum gjørligt, skuldu fáa høvi at síggja leikin og á hendan hátt varpa ljós á sálarheilsu.

Sinnisbati fekk fleiri umbønir aftaná sýningarnar í Norðurlandahúsinum um at vísa leikin aftur. Vit hava eisini upplivað, at fleiri fólk hava vent sær til okkum aftaná sýningarnar, og greitt frá, hvørja ávirkan leikurin hevur havt fyri tey.

Tí varð avgerð tikin um at enduruppseta leikin aftur í 2025. At seta ein tílíkan leik upp krevur nógva tíð, orku og samskipan. Hóast vit ikki fingu sýnt leikin eins ofta, ið vit ætlaðu frá byrjan, eru vit sera fegin um, at tað eydnaðist at seta leikin uppaftur í septembur 2025.

Leikurin varð vístur í Løkshøll í Runavík 18. septembur. Tað var ein almenn sýning og beint yvir 300 fólk sóu leikin. Samstarv varð fingið í lag við Føroya Fólkaháskúla um venjingarhøli, og vórðu næmingar á Føroya Fólkaháskúla bodnir til frumframførslu av leikinum og at koma við til venjingar.

**Toymi**

- Ria Tórgarð, leikstjórnað og evnað leikin til
- Gunnhild Persson (Sinnisbati), framleiðsla og samskipan
- Bárður Persson, leikrit og leikari
- Barbara Hesselager, leikrit og leikari
- Billa Jenný Jónleifsdóttir, pallmynd, búnar og grafikkur
- Villiam Soo Joensen, ljóssnið
- Andreas Samuelsen, Bjørg Clementsen, Gunnvá Winther, Monika Hjelm Joensen, Rebekka Rafael: Pallhjálparfólk, næmingar, læknar, sjúklingar, heksir, tannagríslarar, dansarar og trummusláarar

**Stuðlað enduruppsetanini hava**

Uttanríkis- og mentamálaráðið

Betri

Sinnisbati

MEGD

Føroya Fólkaháskúli

Runavíkar Kommuna

barbara hesselager

bárður persson

# *løstir*



*Av øllum lívum er sálarlívið tað vigtigasta.*
Tey, ið hava vassað upp um knø í
Sálarinnar mórulendi, *skilja*
Tey, ið hava vassað upp
Um knø í
Sálarinnar
Mórulendi, *síggja*
Tey, ið hava vassað upp
Um knø í sálarinar mórulendi, *vita*
*At av øllum lívum er sálarlívið tað viktigasta.*

*leikstjórn eftir riu tórgarð*

ein nýskrivaður leikur eftir BÁRÐ PERSSON og BARBARU HESSELAGER.
RIA TÓRGARÐ leikstjórnar GUNNVÁ WINTHER, BJØRG CLEMENTSEN, REBEKKA RAFAEL
MONIKA HJELM JOENSEN, ANDREAS SAMUELSEN viðleikarar
BILLA JENNÝ JÓNLEIFSDÓTTIR pallsnið, VILLIAM SOO JOENSEN ljóðsnið
GUNNHILD PERSSON framleiðsla

SINNISBATI

## FRAMSØGUKVØLD Í LISTASTOVUNI

Í sambandi við Virknan oktobur bjóðaðu Vága kommuna, Bókadeild Føroya Lærarafelags og Sinnisbati til eitt framsøgukvøld í Listastovuni í Miðvági  9. oktobur. Tiltakið varð skipað við sama leisti, sum tiltakið í Perluni í havn í mars mánaða. Beinir Bergsson legði fram um bókina Undirfullir Heilar, og aftaná høvdu Aleth Vang og Sigurð Lamhauge upplegg um persónligar upplivingar við einum undirfullum heila. Harumframt høvdu Bárður Persson og Marna Jacobsen upplestur.

## MARGRETHA POULSEN 90 ÁR

Í ár kundu vit eisini hátíðarhalda, at Margretha Poulsen fylti 90 ár í august, og í ár hevur hon somuleiðis verið í nevndini hjá Sinnisbata í 35 ár. Margretha hevur verið ein tryggur stuðul hjá Sinnisbata, bæði sum nevndarlimur og eitt skifti sum forfólk. Vit takka Margrethu fyri hennara trúfesti og mongu tøkini øll hesi árini. Vit eru sera heppin at hava Margrethu í nevndini.



## ALTJÓÐA SÁLARHEILSUDAGUR

Á hvørjum ári hátíðarheldur Sinnisbati altjóða sálarheilsudagin 10. oktobur. Sálarheilsudagurin 2025 varð hildin í Smæruni í Havn við yvirskriftini ”sálarsjúka ella sálarlíðing”. Á skránni var fyrilestur við Agnes Marie Frey og Anders Sørensen úr Danmark.

Agnes Marie Frey hevur fleiri hundraðtúsund vísingar á TikTok, og er tilnevnd virðislønir fyri at varpa ljós á sálarheilsu. Agnes, sum greiddi frá um sína egnu søgu, varð mett langtíðarsjúk við diagnosuni paranoid skitsofreni. Eingin spurdi hana um lívsviðurskiftini hjá henni: hon var bara sjúk. Í fyrilestrinum greiddi Agnes frá um sína ferð inn í og út úr líðing, heiligvági og psykiatri.

Anders Sørensen er sálarfrøðingur og ph.d í psykiatri. Í fyrilestrinum greiddi hann frá, hvussu hann sær at sálarlíðingar verða misskiltar í donsku psykiatriini. Hann meinar, at man alt ov ofta starir seg blindan á sjúkueyðkenni og diagnosur og sær ikki, hvørji lívsviðurskifti liggja aftanfyri eyðkennini.

**Sálarheilsuvirðisløn**

Sinnisbati handar á hvørjum ári eina sálarheilsu-virðisløn. Endamálið við virðislønini er at heiðra ein ella fleiri, sum hava varpað ljós á sálarheilsu. Fólk, sum hava gjørt eitt serliga gott arbeiði og/ella átak fyri at betra um korini hjá fólki við sálarsjúku og avvarðandi teirra. Tað stendur øllum í boði at senda inn uppskot, og tað er ein óheft dómsnevnd, sum tekur avgerð.

**Oddvør Poulsen og Elsebeth Sanna á Krákusteini**

Í ár heiðraðu vit tveimum einstaklingum. Vit heiðraðu Oddvør Poulsen fyri hennara góða og týdningarmikla arbeiði í Beranum fyri menniskju í sorg og kreppu. Oddvør hevur givið nógvum einstaklingum og familjum ein møguleika at liva víðari eftir sváran miss. Hon hevur víst serligan førleika til at skapa eitt trygt rúm at deila sorgina og finna vónina í eini tungarið tíð. Oddvør hevur eisini sett fokus á sorg sum eitt sálarheilsu-viðurskifti, sum ávirkar nógv, men sum ofta ikki fær nóg stóra umrøðu í samfelagnum.

Vit heiðraðu somuleiðis Elsebeth Sannu á Krákusteini, sum í fleiri áratíggju hevur arbeitt hjá Almannaverkinum og seinastu árini sum leiðari í sosialpsykiatriini. Elsebeth Sanna hevur við sínum nærlagni, fakligheit, persónligheit og relatións-førleikum verið ein, ið gongur undan innan sosialpsykiatriska økið. Elsebeth Sanna er ein fyrimynd fyri bæði starvsfólk og tey, ið brúka sosialpsykiatrisku skipanina. Hon megnar at fáa bæði starvsfólk og brúkarar at blóma.

Vit ynskja Elsebeth Sannu og Oddvør hjartaliga til lukku við virðislønini og takka teimum fyri teirra góða og týdningarmikla arbeiði.


2025
2025

# FRAMYVIR

Samanumtikið hevur 2025 verið eitt virkið ár hjá Sinnisbata. Fleiri spennandi verkætlanir eru í gerð og fara ígongd í 2026. Sinnisbati gjørdi eina limakanning í 2025 og spurdi, hvørji ynskir limirnir hava til arbeiðið hjá Sinnisbata framyvir. Tað, sum serliga var afturvendandi, var at Sinnisbati skal skipa fyri fleiri upplýsandi limatiltøkum runt í Føroyum. Tí hevur Sinnisbati í 2026 tikið stig til at ferðast runt í Føroyum og hava fyrilestrar og filmssýningar, og koma í tættari samband við limir okkara. 2026 er somuleiðis árið, ið vit fara at stovna eina føroyska ungdómsráðgeving, ið skal vera við til at fyribyrgja mistrivnaði millum ung. Ungdómsráðgevingin skal vera eitt trygt stað hjá ungum at koma og fáa ráðgeving, somuleiðis sum møguleiki verður fyri sosialari samveru.

Vit gleða okkum til enn eitt virkið nevndarár saman við okkara limum, stuðlum og samstarvsfeløgum.

**Sinnisbati**

c/o MEGD, Íslandsvegur 10C

FO-100 Tórshavn

Tlf: + 298 597913

Teldupostur: sinnisbati@sinnisbati.fo

www.sinnisbati.fo